gult12 cyan12 magenta12 svart12




# Scania P93 til sølu



Árg. 1991. Við nýggjari lift. Hevur isoleraðan kassa (Norfig), og er í góðum standi. Til sølu fyri 95.000 kr. v/mvg

**Tlf. 314728 ella 219728**


Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. Sp/f 2382, Sp/f S.L.P., , 100 Tórshavn.

Stjórn:
Farin frá sum stjóri: Sólbjørg Pedersen, Gæsugøta 9, 100 Tórshavn.
Innkomin sum stjóri: Ludvík Pedersen, Gæsugøta 9, 100 Tórshavn.

Skráseting Føroya tann 21. juni 2001

Kristin Balle

---

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. Sp/f 2942, Sp/f Avon, 100 Tórshavn.

Viðtøkur broyttar: 17.04.2001.
Nýtt navn: P/F Avon
Kapitalur: Hækking við kr. 400.000,00 til kr. 500.000,00
Inngjaldingarháttur: Kontant kr. 290.000,00 til kurs 100 og kr. 110.000,00 við skuldarumskifti til kurs 100.
Nevnd:
Innkomin í nevndina: Bjørn á Heygum, R. C. Effersøesgøta 5, 100 Tórshavn (formaður), Beatrice Ann Thomas á Heygum, R. C. Effersøesgøta 5, 100 Tórshavn og Birgit Mikala Thomas á Heygum, R. C. Effersøesgøta 5, 100 Tórshavn.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av stjóranum, av nevndarformanninum ella av allari nevndini.
Endamál: Endamál felagsins er at eiga og umsita fastogn, umframt at reka handil, umboðan og annað starv í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 20. juni 2001

Kristin Balle

---

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. P/F 1914, P/F Torvanes, 470 Eiði.

Viðtøkur broyttar: 04.05.2001
Lækkan av P/F-peningi viðtikið 04.05.2001 er nú gjøgnumførd.
Kapitalur: Kr. 500.000,00.
Nevnd:
Farin úr nevndini: Regin Olsen, Sólteigur 9, 100 Tórshavn, Sigmund Dam, 460 Norðskáli og Daniel Magnussen, 340 Kvívík.
Innkomin í nevninda: Róland Poulsen, 470 Eiði, Jørgin Oluf Kruse, 470 Eiði og Annfinn V. Hansen, 180 Kaldbak.

Skráseting Føroya tann 22. juni 2001

Kristin Balle

---

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. Sp/f 2298, Sp/f A.M.A., 100 Tórshavn.

Viðtøkur broyttar: 15.05.2001.
Nevnd:
Farin úr nevndini: Jóhannus Petur Petersen, Láarvegur 34, 100 Tórshavn (formaður), Oddmar Andreasen, Faksagøta 24, 100 Tórshavn og Ingibjørg Tórhalla Andreasen, Fugloyarvegur 17, 100 Tórshavn.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av einum stjóra.

Skráseting Føroya tann 21. juni 2001

Kristin Balle

---

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. P/F 10, P/F Føroya Banki, 100 Tórshavn.

Nevnd: Farin úr nevndini sum starvsfólkavaldur : Niclas Joensen, Kálvagerði 1, 100 Tórshavn.
Innkomin sum starvsfólkavaldur: Sigmar B. Jacobsen, Reynstún 29, 160 Argir.

Skráseting Føroya tann 20. juni 2001

Kristin Balle

---

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. P/F 3123, P/F Articon, 100 Tórshavn.

Nevnd:
Farin úr nevndini: Jón Danielsen, Folagerði 1, 100 Tórshavn.
Innkomin í nevndina: Aðalstein Hallgrimsson, Fljótasel 27, ÍS-109 Reykjavík.

Skráseting Føroya tann 21. juni 2001

Kristin Balle

---


# Vestmanna Skúli

Søkt verður eftir lærarum til tíðaravmarkað størv við Vestmanna Skúla skúlaárið 2001/2002.

2 lærarar at undirvísa um 26,5 tímar
1 lærara at undirvísa um 20 tímar

Øll størvini eru vegna lærarar við niðursettum tímatali.

Størvini verða lønt sambært sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið í lønarflokkunum 18.1 til 27.4.

Umsóknir við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu vera skúlanevndini í hendi í seinasta lagi mikudagin 27. juni 2001.

**Vestmanna Skúlanevnd**
v/ Bjørg á Rógvi, tlf. 442555
350 Vestmanna

# Skála kommuna

Fyri starvsfólk í farloyvi í 1 ár frá 1. juli 2001, verður hervið søkt eftir handverkara sum avloysara, at byrja skjótast møguligt.

Starvið umfatar arbeiði í samband við vatnleiðingina, kloakkskipanina, havnina og annað fyrifallandi arbeiði í kommununi.

Nærri upplýsingar fáast frá kommunuskrivstovuni tlf. 441179.

Umsóknir skulu vera kommunuskrivstovuni í hendi innan fríggjadagin 29.06.2001 kl. 12.00.

**Skála kommuna**
tlf. 441179

# Skrivari søkist!

Landsfelag Føroyinga í Útbúgving søkir hervið eftir einum skrivara at taka sær av skrivstovu uppgávum felagsins. Starvið er umleið 10 tímar um vikuna.

**Skrivstovuuppgávurnar fevna seg um:**
Vanligt skrivstovuarbeiði, útskriving av LFÚ-kortum, skrivari á stjórnar- og aðalfundum o.a. fyrifallandi arbeiði.

**Vit bjóða tær:**
Eitt spennandi starv í einum mennandi umhvørvi, sum viðvíkur ungum lesandi í Føroyum. Eitt starv saman við ungum fólki frá 19 - 27 ár, ið vilja virka fyri, at útbúgvingarumstøðurnar hjá teimum lesandi í Føroyum alsamt gerast betur og betur.

Vit vænta, at tú ert fyrikomandi og dugir at arbeiða sjálvstøðugt. Royndir innan skrivstovuarbeiði er sjálvandi ein fyrimunur, umframt at tú skalt vera før/ur fyri at nýta teksviðgerðar forrit (serliga Microsoft Word). Eisini er ynskiligt, at tú hevur áhugað at arbeiða innan fakfelagsarbeiði.

Starvið verður lønt eftir nærri avtalu.

Umsóknarfreistin er úti 06. juli 2001, og verður starvið sett frá 1. august 2001.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Turid Christophersen, forkvinnu, á tlf. 21 60 17 ella 31 02 20.

Um hettar ljóðar sum nakað fyri teg, so send eina umsókn, umframt møgulig prógv og ummæli til:

**LFÚ**
Postrúm 136
Tinghúsvegur 18, 3. hædd.
FO 110 Tórshavn

Ella send t-bræv til lfu@post.olivant.fo


gult13 cyan13 magenta13 svart13

# ítróttur



HB-B36:

# Týdningarmikil grannauppgerð

**Hjá báðum er galdandi, at tey valla kunnu loyva sær at missa stig, skal oddafiskurin úr Gøtu fáast aftur**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

Tað er ikki ofta, at B36 er favorittur, tá grannauppgerð er í Havn. Hagtølini aðra staðni á hesum síðum siga harðmælt frá, at HB so greitt hevur verið oman á seinnu árini, tó at tað onkun tíð hevur bragdað hjá B36.

Við útgangsstøði í degnum í dag, so má B36 tó metast sum favorittur. Eftir eina heldur trilvandi byrjan, hava teir svørt/hvítu veruliga fingið ferð á, og seinastu tríggir dystirnir eru vunnir somikið sannførandi sum 22-0.

## Allir tøkir

Hinvegin hava seinastu vikurnar ikki hilnast serliga væl hjá HB. Eitt slag av vend kom kanska í, tá teir fyri viku síðani vunnu trygt á EB/Streymi, men mótstøðumenninir sunudagin eru helst ikki at sammeta við eitt lið, sum stríðis í niðara endanum av stigatalvuni.

Til dystin hevur HB so at siga allar mans tøkar. Hans á Lag er enn ikki byrjaður at venja eftir skaða, men burtur sæð frá honum eru allir mans tøkir. Eisini Uni Arge, sum tað framgongur aðrastaðni.

Um Arge maðurin byrjar inni frá fyrsta bríksli eftir sjálvbodna steðgin, er tó ein avgerð, sum venjarin má taka. Tað er væl hugsandi, at Uni fyri fyrst má taka til takkar við einum plássi á beinkinum, men hinvegin er tað so avgjørt ikki tann ringasti jokarin at hava hjá einum venjara.



*Umframt vanliga heiðurin í eini lokaluppgerð, so hevur dysturin millum HB og B36 alstóran týdning fyri, hvat lið skal renna í hølunum á gøtumonnum*

## Fleiri ivamál

Í B36 húsinum eru tey meira ivasom, tá tosað verður um, hvørjir leikarar verða tøkir til dystin.

Størsti spurningurin er helst, um tað eydnast teimum at fáa Pól Thorsteinsson kláran til dystin. Hann hevur ikki verið við, síðani tapið í Gøtu, men arbeitt verður av øllum alvi fyri at fáa hann kláran.

Magni á Lakjuni hevur enn ikki vant við fullari ferð, og roknað verður ikki við, at hann verður klárur til dystin, meðan einki ivamál er, tá tosað verður um Herbert í Lon Jacobsen. Hann hevur skaða í lærinum, og fær tí ikki spælt.

Sum sagt hevur dysturin sunnudagin alstóran týdning fyri liðini bæði. Ikki bert er talan um eina lokaluppgerð, men ein møguligur tapari má helst finna seg í at verða krøktan burtur í oddastríðnum, har gøtumenn framvegis tykjast púra einaráðandi.

# Uni verður við



*HB-.viðhaldsfólkini kunnu nú aftur gleða seg til at síggja hesa væl kendu sjónina*

**Ósemjan í HB er nú loyst, og Uni Arge er aftur til reiðar at tørna út fyri barndómsfelagið**

SEMJA
*Jákup Mørk*

Gitingarnar um framtíðina hjá Una Arge hava verið nógvar seinastu báðar vikurnar. Eftir innanhýsis ósemju í HB var álopsmaðurin ikki við undanfarna vikuskiftið, og nógv varð gitt um, hvar hann nú fór at spæla. Slaturin ljóðaði um, at framtíðin var í Eysturoynni, har GÍ, NSÍ og B68 øll høvdu sýnt áhuga, men nú sigur áleyparin sjálvur, at hetta so verður av ongum.

- Vit hava tosað saman, og avgerðin er, at samstarvið heldur fram.

- Tú kanst siga, at hurðin varð klamsað aftur í eina viku, men nú verður hon latin upp aftur. Niðurstøðan er, at allir partar hava eitt felags mál, og tað er HB, sigur Uni Arge.

- Ósemjan stóðs av, at tá tað ikki gongur eftir vild, verða menn nakað heitir. Men tað hjálpir at tosa saman, sigur Uni at enda.

Hesi orð vóru søgd hóskvøldið, og sostatt er líkt til, at Uni verður við í hópinum, tá HB sunnudagin skal royna seg móti B36. Talan verður tó bert um eina venjing undan dystinum hjá Una, og spurningurin er so, um hann verður millum teir fyrstu 11 hjá Ioan Geolgau, ella um hann í fyrstu atløgu má taka til takkar við einum plássi á beinkinum.

VB-EB/Streymur:

# VB fer ikki á jóansøku

**Popczynski roknar við torførari avbjóðing í morgin, og hann heldur tað framvegis vera møguleiki fyri at endurvinna FM**

UPPTAKT
*Jóannes Hansen*

Eftir at VB á heimavølli hevði tapt ímóti GÍ, setti VB venjarin, Krzysztof Popczynski, sær sum mál, at hansara lið í trimum teimum næstu dystunum skuldi vinna níggju stig. VB hevur síðani vunnið ímóti NSÍ og B71, og nú stendur EB/Streymur fyri tørni:

– Eg rokni við, at teir fara at spæla, sum teir gjørdu í Klaksvík. Tað vil siga, at teir fara at verja og dúva upp á kontra. Tað er ongantíð lætt at spæla ímóti sovornum liðum, men eg havi tað álit á mínum monnum, at teir fara at megna uppgávuna. Allir spælararnir eru tøkir, og vit eru væl fyri.

Men í vikuskiftinum er tað jóansøka á Tvøroyri?

– Eingir av okkara spælarum fara á jóansøku. Vit hava arbeitt saman í trý ár. Allir vita, at um nakað skal spyrjast burturúr, so krevst hvíld dagin undan dystardegnum, og soleiðis verður tað eisini hesa ferð. Spælararnir venja nógv, og teir eru væl fyri, og eg veit, at teir taka uppgávuna ímóti EB/-Streymi í størsta álvara, staðfestir VB venjarin.

Droymir tú um at endurvinna FM?

– Hjá okkum sær tað betri út nú, enn tað gjørdi fyri nøkrum vikum síðani. Vit mugu bara hugsa um okkara dystir og bara um eina uppgávu í senn. Annan sunnudag skulu vit spæla í Gundadali ímóti B36. Tann dystin fara vit at hugsa um, tá tann ímóti EB/Streymi er liðugur. Men tað verður ein sera týdningarmikil dystur. GÍ hevur higartil vunnið hvørja ferð. Spurningurin er, hvussu tað fer at hilnast hjá teimum, tá teir fyrstu ferð hava mist stig. Dysturin hjá teimum mikukvøldið ímóti B68 verður sera spennandi.

Hjá EB/Streymi eru allir spælararnir tøkir. Eyðfinn Joensen gjørdist sjúkur dagin fyri HB dystin. Hann er frískur aftur, og hann hevur vant í vikuni.

Bergur Magnussen ásannar, at teirra lutur verður at verja og at dúva upp á snarálop. Tað hilnaðist væl í Klaksvík, meðan einki bar til ímóti HB.

# Dystir um vikuskiftið

**1. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 24.06 | KÍ-FSV | Birgir Sondum |
| 24.06 | HB-B36 | Lassin Isaksen |
| 24.06 | VB-EB/S | Petur Hansen |
| 24.06 | B71-NSÍ | Suni Johansen |
| 27.06 | GÍ-B68 | Oddmar Andreasen |

**2. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 23.06 | KÍ-Skála | Erling Eysturoy |
| 23.06 | ÍF-NSÍ | Regin Egholm |
| 23.06 | GÍ-HB | Hans F. Hansen |
| 23.06 | B36-LÍF | Dagfinn Olsen |
| 23.06 | TB-Sumba | Jógvan A. Jacobsen |

**3. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 24.06 | GÍ-B68 | Jonhard Hansen |
| 24.06 | KÍ-ÍF | Regin Egholm |
| 24.06 | AB-B36 | Johnleif Gerðisá |
| 24.06 | VB-TB | Petur E. Kjærbo |
| 24.06 | Royn-B71 | Lars Müller |

**1. deild kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 23.06 | VB-KÍ | Petur E. Kjærbo |
| 23.06 | HB-B68 | Georg Rasmussen |
| 23.06 | B36-B71 | Eigil Olsen |